# ferð um dagin

*Ætlanin var at hava 64 stampar við henda túrin. Tá avtornaði vórðu teir kortini 74 í tali*

*Mynd: Høgni Thomsen*



## Ov fáir ungir egnarar

Við Søkanum eru teir vanliga fýra mans. Haraftrat er ein maður í landi og stendur hann fyri egningini.

Tað er fyri tað mesti pensjónistar sum egna hjá Søkanum, tí, sum Ólavur sigur: - Tað er trupult hjá teimum ungu at fáa tíð til egning!

Skúlin fer við sínari tíð – og gjarna nógv ár fram í tíðina. Og ítrótturin fer við einum stórum parti av frítíðini hjá teimum ungu.

- Skulu tey vera virkin í eini ítróttargrein, er neyðugt at tey ofra seg 100 prosent. Og so má okkurt víkja.

- Tað vísir seg tíverri, at tað er hetta økið sum má víkja – hetta økið, sum annars hevði verið so ótrúliga læruríkt hjá teimum ungu!



*Søkin er bygdur í 1965 úr Eik, og kann lasta 24 BRT.*

*Mynd: Høgni Thomsen*



*Fýra mans eru við Søkanum og ein í landi. Trupult er at fáa teir ungu menninar at egna*

*Mynd: Høgni Thomsen*

## Hýsa dámar ikki gággu

Tað er altíð ymiskt, hvat agn, ið menn halda at fiskinum dámar best.

Tá Søkin legði frá landi seinnapartin í gjár var gágga egnd á eina góða helvt av teimum 74 stampunum. Hin helvtin var annaðhvørt saury ella høgguslokkur.

- Hesa tíðina plaga vit at brúka gággu fyri tað mesta. Tað gera vit so eina góðan mánað aftrat, og fara so yvir aftur til annað agn.

- Gággan plagar ikki at vera so góð til hýsuna, greiðir Ólavur frá.